# Dansur á bryggjuni á Tvøroyri

Mangt er á skránni um vikuskiftið, eisini í Suðuroynni. Leygarkvøldið verður "Dans på brygga" á Tvøroyri, har bólkurin 005 spælir góðan dansitónleik, bæði yngri og eldri tónar. Bæði Pubbin og Seglloftið hjá Thomsen eru opin, meðan dansur er. Tað er 18 ára aldursmark at sleppa inn á Pubbina og Seglloftið. Í kvøld spæla Tróndur Enni og Uni R. Debess á Pubbini. Tiltøkini byrja ávíkavíst klokkan 23:00 og 23:30.



# Avleiðingar av skerdum fiskidøgum

**- Um ætlaðu skerjingarnar av fiskidøgum koma ígjøgnum, kunnu hesar fáa stórar avleiðingar fyri fiskimenn, reiðarar og flakafólk, sigur Óli M. Lassen, reiðari, sum í hesi samrøðuni í stuttum greiðir frá nøkrum av avleiðingunum**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Óli M. Lassen, sum er reiðari á Jákupi B og útróðrarbátinum Líðhamri, sigur, at ein línubátur, sum missir stívliga 20 vanligar fiskidagar og stívliga 30 fiskidagar á Føroyabanka, missir 2 miljónir krónur í sølu.

- Í eini slíkari sølu er 1 miljón krónur manningarpartur, og tað merkir, at ein dekkari missir 50.000 krónur í hýru um árið, sigur Óli.

Hann vísir á, at um ein stórur útróðrarbátur missir 20 fiskidagar, svarar tað til, at hann missir einar 800.000 krónur í sølu.

- Hýra við frítíðarløn er umleið 3.000 krónur hvønn túrin, og tað merkir, at ein útróðrarmaður missir umleið 60.000 krónur í inntøku um árið.

Óli sigur, at ein skerjing í fiskidøgum upp á 20% soleiðis fer at fáa víttfevndar avleiðingar fyri fiskiflotan, manningarnar og tey flakafólk, sum virka fiskin á landi.

- Hjá línuskipum og útróðrarbátum er tað mest sum ómøguligt at útvega sær eyka fiskidagar, sjálvt um tað liggja óbrúktir dagar hjá teimum smærru útróðrarbátunum.

Reiðarin vísir á, at tá ið hesir bátar ikki hava brúkt 60% av hesum døgum árið fyri, kunnu teir ikki selja dagar.

- Hjá línuflotanum er tørvurin á fiskidøgum stórur og við vánaligum rakstri hava línuskipini eisini torført við at fíggja keyp av fiskidøgum, sigur hann.

### Akademiskt tos

Sum flestum kunnugt eru flestu línuskip yvir 30 ára gomul, og útróðrarflotin er langt yvir 40 ár. Her er soleiðis talan um ein gamlan flota.

Óli sigur, at umleið 45 útróðrarbátar eru

farnir úr flotanum síðan miðskeiðis í nítiárunum.

- Samstundis liggur ein ørgrynna av stórum útróðrarbátum við bryggju, og einstøk línuskip hava eisini ligið ein stóran part av árinum, men hetta verður líkasum ikki tikið við, sigur hann.

Reiðarin heldur, at havrannsóknarskipið Magnus Heinason man vera eitt hitt ófiskiligasta skipið í flotanum.

- Eg haldi tað vera alneyðugt, at vit gera sum eitt nú norðmenn gera og hava annað skip, ið togar á somu leiðum sum havrannsóknarskipið fyri at prógva, hvussu ófiskiligir teir eru, sigur Óli M. Lassen.



*Óli M. Lassen, reiðari á Jákupi B og Líðhamri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Samtak bað um vernd

**Hóast arbeiðarafeløgini í Samtaki í gjár alment mótmæltu skerjing av fiskidøgum, søgdu feløgini aftanfyri samtakið fyrr í summar, at munadygg tiltøk mugu setast í verk sum kunnu tryggja, at toskurin og onnur fiskasløg kunna menna seg aftur í føroyskum sjóøki**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*7. juli søgdu feløgini í Samtaki, har Føroya Fiskimannafelag eisini er við, at landsstýri og løgting mugu gera munadygg tiltøk, sum kunna vera við til at tryggja, at toskur og onnur fiskasløg kunna menna seg aftur. Í gjár mótmæltu arbeiðarafeløgini ætlaðum niðurskurði í fiskidøgum*

Í yvirlýsing í gjár mótmæltu feløgini í Samtak, sum eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag, at meirilutin í løgtinginum vil lækka fiskidagatalið so ógvusliga, at hetta ikki bert fer at fáa avleiðingar fyri fiski-og útróðrarmenn, men eisini fer at skapa enn vánaligari livikor fyri vanliga arbeiðsfólkið á landi.

Samtak sigur í yvirlýsingini, at feløgini mótmæla harðliga teimum inntrivum, sum løgtingið hevur ætlanir um at fremja.

- Hesar skerjingar, sum løgtingið nú ætlar at fremja, vísa okkum enn einaferð, at teir politikarar, sum hava sagt seg vilja verja fiskimannin og vanliga løntakaran, als ikki vísa virðing fyri hesum samfelagsbólkum, siga arbeiðarafeløgini í Samtak.

### Bað um lækking

Á heimasíðuni hjá Samtak, 7. juli í ár, er ein onnur yvirlýsing, har somu feløg harmast um, at fiskastovnarnir ikki hava verið betri røktir seinastu árini.

- Feløgini vóna veruliga, at landsstýri og løgting taka henda spurning í álvara og gera nøkur munadygg tiltøk, sum kunna vera við til at tryggja, at toskurin og onnur fiskasløg kunna menna seg aftur í føroyskum sjóøki.

Men rætt skal vera rætt.

Feløgini í Samtaki søgdu eisini í yvirlýsingini 7. juli, at landsstýrið eigur at hugsa seg sera væl um, áðrenn farið verður undir at gera stórar broytingar.

- Ansast má væl eftir, at tær broytingar, ið landsstýrið fremur, ikki ganga útyvir fólkið, ið hevur sítt livibreyð í fiskivinnuni, sigur Samtak.




**The very best of Word, Excel, Outlook & PowerPoint**

**Brúkar tú** Word, Outlook, Excel og Power Point í tínum dagliga arbeiði? Gjørt tú tingini uppá tann ósmarta mátan við fult av umvegum?

**Kundi tú hugsa tær** at fingið ein lættari dagligdag við hjálp av forritunum? Svarar tú ja uppá hesar spurningar, er stundin komin at arbeiða eitt sindur smartari og gagnnýta tey amboð tú longu allíkavæl hevur.

**Skeiðið hevur fingið** sera góðar eftirmetingar.

**Max. 14 luttakarar**

**Tilmelding**
Les meira og tekna teg á heimasíðu okkara á www.synergi.fo • tel 32BELL (322355)

**Tú lærir alt millum himmal og jørð**

um myndir • brottalvur • stór skjøl • brøv teldupostar • etikettir • samanspælið millum Word og hini Office forritini • stýra teldupostunum • kalendarin • fundarinnkalling • avtalur • uppgávufunkan • kontaktpersónar • tíðindi til kundar formlar formatera cellir • kolonnir • rekkjur • ørk finna data • yvirlit yvir stórar mongdir av upplýsingum • innihaldsyvirlit • filtur skiljing • subtotalir • ritmyndir • formar tekniamboð • møguleikar við slóðum • kopiera frá excel uppá tann fixa mátan

**Vælkomin** til tiltøk hjá Synergi

Synergi

Synergi • Tvørgøta 1 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa